gult14 cyan14 magenta14 svart14

Símun Hammer, fyriskipari av fiskivinnustevnuni:

Neyðugt at stýra væl fíggjarliga

Símun Hammer fyriskipari av fiskivinnustevnuni í Runavík sigur seg vera avbera vel nøgdan við tiltakið, sum eftir ætlan skal vera annaðhvørt ár. Tiltakið mælir runt, men tað er ikki "big business"

FISKIVINNUSTEVNAN
Stefán í Skorini

Símun Hammer, ið skipar fyri stevnuni, er ábera vel nøgdur higartil, men hann sigur, at tað er neyðugt hjá teimum stýra væl fíggjarliga. Mynd: Jens Kr. Vang

- Eg haldi, at bæði teir útlendsku og teir føroysku útstillararnir hava fingið vel burturúr á hesi stevnuni, sigur Símun Hammer frá PJF Virksisøgeving, sum skipar fyri fiskivinnustevnuni inni í Runavík. Tað var AtlanticFair, ið setti seg í samband við Símun um at skipa fyri eini slíkari stevnu.

Stevnan lat upp tysdagin, og nógv fólk hevur verið og vitjað básanar hesar dagarnar.

Nú latið varð upp tann triðja dagin, dugur Símun Hammer sambarum.

- Eg havi verið og spurt meg fyri ábásunum, og teir flestu lata vel at Smávegis trupulleikar stinga seg alfrá upp, men soleiðis vil alfrið verða. Vit hava eini 200 útstillarar, sum alfrið skulu vera nøgdir, so tað kann vera trupult onkuntíð, sigur Símun.

Annaðhvørt ár

Hóast henda fyrsta stevnan ikki er lívug enn, eru fyriveikasamir longu farnir at hugsa um framtíðina. Ætlanin er at skipa fyri hesi stevnuni annaðhvørt ár inni í Runavík, og hugsað verður tí longu fram í mótið tí næstu stevnuni um tvey ár.

- Ætlanin er at gera hetta tiltakið til eina traditión, sum verður annaðhvørt ár, sigur Símun Hammer.

Soleiðis vita útstillararnir alfrið, nær fiskivinnustevnan í Runavík er, stevnan kann nú góliga sláa sítt navn fast millum aðrar stevnur.

Breið stevna

Tá hugt verður nærri eftir básunum sæst, at úrvalið av vørum og tenastum er ógvuligabreitt, og næstan eindki mark er fyri, hvørt kann vera við. Her eru bankar og tryggingarfelagið saman við trolutgerð.

Onkur vil kanska vera við, at hetta er ein veikleiki hjá stevnuni, at hon er ov breið. Símun Hammer metur hinvegin, at hetta heldur er einstyndi.

- Fiskivinnan sum heild er ógvuliga breið, og tað sæst aftur á stevnuni. Eitt flakavidki hevur ikki sama tørv sum ein trolari og eitt alibrúk. Hetta er ein marknaður fyri øll, og tí fáa fleiri fyritøkur plássið á stevnuni.

Eingin beinleiðis sala fer fram á stevnuni, men hinvegin verða nógvar avtalur gjørdar og sambond verða knytt millum veitarar og kundarar.

Eisini verður stevnan eitt forum, har fyritøkurnar kunnu nema sær kunnleika um sínar kappingarmeytar og lúra teina arbeiðshátt av.

Meiri runt

Símun Hammer sigur, at stevnan skal mála runt fíggjarliga. Enn veit hann ikki, hvussu endaliga úslitið verður.

- Fíggjarliga skal henda stevnan mála runt í sær sjálvum. Hetta er eitt tungt tak at taka, men um tann fíggjarliga styringin er nógg góð, ber tað til. Tað er neyðugt, at vit hava eitt lítið avkast eftir stevnuna, so vit hava nakað at arbeiða við til næstu ferð.

Símun Hammer leggur hinvegin dent á, at hetta ikki nøkur góð forsetning at hava slíkar stevnur, og fi er neyðugt at stýra væl fíggjarliga.

Góð útlit fyri fiskivinnuni

Justinus Leivsson
Eiðsgaard

Básurin hjá Fiskirannsóknarstovuni á fiskivinnustevnuni í Runavík hevur góð boð til fiskivinnuna. Í básinum hongur ein talva sum vísir samanhangin millum gróður í sjónum og hvussu fiskur og djór sum liva av gróðrinum av øti í fiski í sjónum hava tað og hvussu nógv er til at teimum.

Talvan vísir greitt hvussu samanhangurin er millum gróður í havinum og hvussu tilfeingið tívist.

-Hyggur tú eftir talvuni, sum fevnir um tíðarskeiðið 1990-2000 so sæst tíðliga hvussu gongdin er. Fyri figgju árum síðan var næstan ongin gróður í havinum. Fiskurin var rak og lítið var til. Tað var eisini tá, at kreppan byrjaði. Men kurvar heldkar longu og er hægst miðskeiðis í nútíðarinum. Tá var eisini nógvur av feitur fiskur, síðan lækkaði hann aftur og mú er hon aftur heilt uppi í gjógnum, hæg er enn miðskeiðis í nútíðarinum. Tað vil siga at góðir árgangir eru á veg inn í fiskiskapin, hesir eru alfrið eitt sindurseinni, tí øti skal eisini hava tíð at vaksa, sigur Eilif Gaard.

-Tað sæst eisini á kurvunum, hvussu djór hava tað, tá lítil gróður er í sjónum og tá nógvur gróður er. Vit minnast hvussu illa stóð til við lomvigastovninum fyrst í nytiárunum. Vit hava gjørt teljingar í Hjørvarnum í Skúvoy og hesar vísa greitt, at tá nógvur gróður er so veksur lomvigastovnurin og hann minkar, minni er at eta úr sjónum, sigur Eilif Gaard.

-Kurvan vísir eisini hvussu skjótt fiskur veksur, tá nógvur gróður er í sjónum og hvussu rak hann er tá ongin gróður er í sjónum. Eitt nú fyrst í nútíðarinum, tá var fiskurin undir Føroyum sera rak.

Nógv fólk hava vitjað básin hjá Fiskirannsóknarstovuni á fiskivinnuframsyningini í Runavík og tao eru ikki bara fiskimenn og reiðarar.

Vælvitjað

Básurin hjá fiskirannsóknarstovuni hevur verið sera vælvitjaður og tað eru ikki bara fiskimenn og reiðarar sum gava áhuga fyri Fiskirannsóknarstovuni.

-Her hava eisini verið nógvir skúlanemingar og fólk annars, sum hava áhuga í fiskivinnuni, sigur Fia Lindenskov, sum hósmorgunin ansaði eftir básinum hjá Fiskirannsóknarstovuni saman við Eilig Gaard, fiskifrøðingi.

6000 vitjandi higartil

Talið av vitjandi í fiskivinnustevnuni hevur verið høgt, og fyrirsitarnir ventaðu als ikki so nógv fólk í stevnu

FISKIVINNUSTEVNA
Stefán í Skorini

Tann fyrsta dagin, stevnan var opin, vóru 2000 fólk og vitjaðu. Tann næsta dagin var talið 4000 vitjandi, so tveir teir fyrstu dagarnar vóru tilsaman 6000 fólk á fiskivinnustevnu í Runavík. Tá eru útstillararnir ikki taldir við.

Málið var 3000

Símun Hammer, fyriskipari, sigur, at teir høvdu sett sær sum mál at hava 3000 vitjandi allar dagarnar tilsamans. Hetta málið er sostatt langt síðani nátt.

- Eg vænti, at talið fer at koma uppá eini 8-10.000, tá stevnan er at enda komin, og tað eru vit vel nøgdir við.

Tey vitjandi eru tó ikki sum sild í tunnu, tí 4000 fermetrar eru tøkir til stevnuna.

gult15 cyan15 magenta15 svart15

hygg & hoyr

Frá fríggjadegi 18. mai til hósdagin 24. mai

Armageddon

Ein stórur rúmdarsteinur á stødd við Texas hevur kós móti jørðini við fullari ferð. Fólk eru longu farin at merkja smáar steinar regna niður á jørðina, sum hava stórar øvileggingar við sær. Men tað er einki aftur í mótið tí, sum fer at henda, um steinurin rakar jørðina.

NASA er ikki fyrireikað til vanlukkuna og setir eina bjargingarætlan í verk. Teir fáa fatur á Harry Stamper (Bruce Willis). Ætlanin er, at hann skal verja eitt lo av rúmdarmonnum, so tey kunnu bora eitt hol í rúmdarsteinin og spreingja hann í luftan, áðrenn hann rakar jørðina.

Bestubitar: Krígsdøtur 1:3

Á ferð við "United Voices"

Lygnarin

The Cable Guy

Verkfall og tíðindaflutningur.

Árant Hansen umrøðir:

Verkfallið á privata arbeiðsmarknaðinum hevur sjálvandi havt sítt pláss í fjølmiðlunum hesa vikuna. Og tí, meti eg, at vit hoyra ella síggja alt ov lítið til sjálva hjarðuna í tretuni. ÚF og SvF hava fyri tað mesta tosað við fólk, ið ikki nettiliga vita, hví tey standa blokkaðuvaktir. Alt ov ofta verður verkfallið gjørt til eitt slag av "happening". Eg salmi meira journalistikk á økinum. Tíðindamennsendingar, sum veruliga lysa stóðuna. Ingeborg var gestur í nýggja grýna umhvørvinum hjá Degi og viku nú tyskvøldið, og fekk hon høvið til at siga sína meining um stóðuna hjá sínum parti av arbeiðsarfjøldini. Men, hvar vóru hini? Arbeiðsgevarnir og Kadi? Og so politikararnir og serfrøðingarnir, sum vanliga traoka hvørnn annan á ternar fyri at sleppa framat at gera viðmerkingar, hvørja ferð ein nýggj veljarskanning er almannakunngjørð? Er samleikin ikki bara tann, at ein veljarskanning er so deiliga fiktiv samanborin við eitt veruligt verkfall eitt lítið árundan lógtingsvali? Hetta er alt spurningar, sum tíðindafólk skuldu sett sítt viðkomandi. Men, nei, tá er ólíka lettari hjá tíðindadeildini hjá SvF at leta Ole Sippel frá DR seta sítt sjóneyka á journalistiska einareðið hjá Berlusconi í Italia.

Annars er lítið nytt handan ljóðtakið og framman myndatólið. Sonna sendingar hava verið allan veturin, góðar og minni góðar. Og nú fólk duga skráimar uttanat, nærkast summarskráimar. Tað í sær sjálvum er neyvan nakað at gleða seg til. Gloymið bert ikki børnini. Men hinvegin hava fjølmiðlamir á ein hátt minni tydning, tá veðrið er gott og høvið byðst at vera úti undir høgum himli. Men eitt lummalurt millum fjalla kann vera sera hugnaligt. Til síðst tvinni málslig fyrbrigði í ÚF.

Tíðindini. Útvarpið hevur verið í Kollfjarðadali og loddað dypið..

Og so Elis í einum epilogi eftir ein norskan sjelara:- Ja, hvørt leingist ikki heim til sína einstu einu og Sannu (sannu? red.)..

Gott summar.